VIÐMERKINGAR

# Nú er ikki nógv at siga NEI fyri

**Sonja F. Mørkøre**

Eg sat her á flatlondum og fylgdi valinum um kommunusamanlegging í Sundalagnum. Sjálvt um eg ikki havi havt bústað í Hósvík í nógv ár, havi eg tó mínar røtur í Hósvík og fylgi við áhuga tí, ið hendir í heimbygd míni. Eg var fyri at siga tað pent sjokerað yvir úrslitið: NEI. Sum tann einasta kommunan, var tað Hósvíkin, sum segði nei. Sig mær hvat í allari víðu verð hugsa tit fyri tykkum? Ella rættari spurt: hugsa tit? Hvussu ætla tit at klára tykkum sum ein lítil "Palle alene i verden" uttan fyri alt og øll? Hvat við útbygging av skúlanum, betran av ansingarplássum til børnini os.fr. Halda tit virkuliga, at tit klára alt uttan samstarv við hinar kommurnar? Tit mugu rokna við, at hinar kommunurnar ikki eru sinnaðar í at hava tað stóra samtarvið við tykkum, tá tit nú hava meldað tykkum úr felagsskapinum.

Tað hevur verið attraktivt hjá barnafamiljum at flyta til Hósvíkar, tí bygdin liggur so centralt, og tað er skjótt at koyra til Havnar. Hvør tímir nú at flyta til eina bygd, sum siglir sín egna sjógv og sum hevur stórar uppgávur fyri framman? Dagrøktin klárar illa at fylgja við barnavøkstrinum, skúlin nøktar ikki nútíðarinnar tørv, og nógv eru børnini undir skúlaaldur. Hvat nú um/tá eldraøkið verður lagt út á kommunurnar? Hvar fáa tit pengarnar frá?

Tað ringasta av øllum er, at eg trúgvi ikki, at tit, sum hava atkvøtt nei, hava hugsað framm í tíðina. Ístaðin hava tit hugt aftur í tíðina og lurta eftir teimum gomlu negativu og ókonstruktivu bygdarfólkunum, sum liva í 1950'unum (ella nær tað var), tá Hósvíkin sleit seg leysa frá Hvalvíkini. Hetta gamla bygdaklandrið sum eg og onnur við mær bara hava grinið at. Eg trúði also, at hetta bygdarsliga snævurskygni var farið í ommu sína, men tað sær ikki soleiðis út.

Summi vilja verða við at Hósvíkin er Føroya nalvi, tí hon liggur so centralt. Sum úrslitið hevur víst seg í kvøld, kann eg ikki lata verða við at hugsa um barnabókina "nalvi framman, prumpur aftan". Við at seta nei á atkvøðingarseðlin hava nei-sigaranir kúvent frá at verða ein centralur nalvi til at vera ein prumpur aftan. Eitt lítið hol, ið liggur goymt og krógvað einsamalt í tí svarta myrkrinum.

Hósvíkingar hava ofta borið orð fyri at vera tvørir, hesum brekinum kann eg sjálv ikki fullkomiliga siga meg fría fyri at hava; men at meirlutin av hósvíkingum eisini stóðu so aftarlaga í køini, tá Várharra lutaði út vit og skil, sum úrslitið í kvøld vísti, visti eg ikki.

VARPIÐ
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá
TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network
Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel
Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

# Kommunesamleje

**Hans Jensen**
*Hvalvík*

Der er ikke noget så deprimerende som at få sine ynglingsaversioner knust.

Jeg har nu brugt 22 år af mit liv på at lære, forstå og indse at alle, der ikke bor i Hvalvik kommune er imbecile idioter.

Det har været en svær læretid. I starten var man jo naivt fordomsfri, og var af den fejlagtige mening, at der vel ikke kunne være så stor forskel på folk inden for et så lille område.

Men ved nærmere forskning har jeg desværre måttet revidere min opfattelse. Der er uoverstigelige problemer mellem kommunerne som gør en kommunesammenlægning helt utopisk.

F.eks. er der mellem Hósvik og Hvalvik en gammel sag fra 50-erne om nogle gadelygter, der ikke blev sat op for ikke at tale om en gravko, der blev fjernet af sysselmanden. Gravalvorlige sager, der helt naturligt forhindrede ethvert samarbejde i generationer.

Angående Saksun og Gjogv er der bred enighed. Ingen vil have dem med. Bygderne er jo stort set beboet af oldsager, der bare kommer til at belaste de sociale budgetter.

Haldorsvik og nordefter er jo ren underskud, hvor vi andre fornuftige kommuner skal betale for deres økonomiske vanvid.

Hvad angår Nordskála /Oyra mænd, er sagen mere kompliceret, men jeg har hørt fra pålidelig kilde, at de var professionelle fåretyve sidst i 1800 tallet. I hvert fald står det fast at, en ungmø fra Hvalvik blev besvangret af niddingsmænd fra Oyra Mikkjalsmesse 1898. Denne sag har endnu ikke fået en værdig løsning.

At der ikke er nogen grund til at lægge sammen med Eide, siger sig selv. De har allerede selv bygget alle de ting, som kommunerne skulle være fælles om.

Nej – lad os have vores frihed til i hver kommune at bygge vores egne idrætshaller, forboldsbaner, universiteter, havneanlæg, sygehuse, lystbådehavne og oprette vores eget militær, i tilfælde at fjendtligsindet angreb fra tilliggende kommuner.

En ægte demokratisk, økonomisk forsvarlig løsning, der vil cementere Sundalagets befolkning som det fri initiativt sande fanebærer - om end ikke de mest kløgtige.

Stod det til mig, slap vi os af med Streymnes – der har nu altid været noget suspekt ved dem på den anden sige af åen…

# Vit hava loysnirnar – meðan samgongan berjist

**Heðin Mortensen**
*Løgtingsmaður*



Tað eydnaðist Tjóðveldisflokkinum og Fólkaflokkinum at súlta málið um Tekniska Skúla í Havn, soleiðis at ongin skúli kann byggjast í bræði.

Sambandsflokkurin hevði eitt konkret uppskot um fígging av skúlanum, soleiðis at byggjast kundi beinanvegin. Talan var um eitt sera greitt uppskot, har man hækkaði rakstrarjáttanina til skúlan, soleiðis at Tekniski Skúlin sjálvur, sum sjálvsognarstovnur, kundi taka lán og byggja. Rentur og avdrøg av lánunum skuldu so fíggjast yvir raksturin.

Eftir hesi ætlan kundu eisini aðrar íløgur verið gjørdar, sum hava ligið alt ov leingi á láni her í samfelagnum. At hesar íløgur liggja á láni, kunnu vit takka sitandi samgonguni fyri, sum yvir ein kamb hevur skorið ríkisstuðulin við 366 mió. krónum um árið.

Tá hetta árið er runnið, hevur hesin niðurskurður kosta føroyska skattgjaldaranum 732 mió. krónur, (ella tað sama sum tað hevði kostað at bygt 8,4 tekniskir skúlar). Vit kundu fyri hesar pengarnar bæði bygt Tekniskan Skúla, Handilsskúla og Studentaskúla, og goldið alt yvir eitt ár, men tað eru tjóðveldismenn ikki sinnaður til.

Tað er ikki dagur, at vit ikki hoyra um, at peningur manglar á øllum økjum í samfelagnum, men tað kemur ikki sitandi samgonguni til hugs at lætta um dagligdagin hjá vanliga føroyinginum.

Tjóðveldisflokkurin er í dag í ferð við at koyra landið á húsagang. Hvør minnist ikki fíggjarmálaráðharran hjá Tjóðveldisflokkinum, sum seinast í 80-unum segði, at allir kassar vóru á tremur. Tríggjar mánaðar seinni fór landið á húsagang. Vónandi endurtekur søgan seg ikki hesaferð, við Tjóðveldisflokkinum á odda í fíggjarmálum.

**Tvey mál við ymiskari prioritering**

Tvey mál komu í mentunarnevndina í mars og apríl. Annað var um Miðnámsskúlan í Vági og hitt var um Tekniska Skúlan í Havn.

Málið um skúlan í Vági sá dagsins ljós og bleiv avgreitt av einum samdum løgtingi. Hitt málið um Tekniska Skúlan í Havn, liggur formaðurin, Jógvan Arge, enn á. Ikki kláraði hesin tjóðveldismaðurin at avgreiða málið, áðrenn tingið fór heim fríggja-dagin.

Tá tingið kemur saman aftur á ólavsøku, tekur Anita á Fríðriksmørk við aftur sum formaður í mentanarnevndini. Tá kann Jógvan Arge aftur átaka sær rolluna sum býráðslimur í andstøðu. Súltingin av Tekniska Skúla í Havn eydnaðist til fulnar.

**Fólkaflokkurin tagnaður**

Tað sigst, at samgongan hevur verið til thefund hjá Høgna Hoydal, og hesin hevur eftir øllum at døma bukað Fólkaflokkin uppá pláss. Óli Breckmann, sum seinastu dagarnar hevur rópt um, at skúlin skuldi byggjast "við ein rasandi fart" er tagnaður.

Ein skúlaætlan skal nú vera á veg, siga tey. Tingið, mentamálanevndin og almenningurin kenna einki til hesa skúlaætlan. Enn er einki komið fram um, nær skúlin skal byggjast, ella hvar peningurin skal koma frá.

Hvat er tað fyri ein heildarætlan talan er um, tá ið tað bara manglar at byggja ein skúla aftrat, tað er hann í Havn?

Sambært Óla Breckmann hevur mann nú sett eina nevnd at granska og kanna. Ein ávísir persónur setti eisini "en komete for at intet skulle ske"!

**Myrkaspæl**

Løgmaður sigur nú, at skúlamálið er eitt innanhýsis mál í samgonguni. Nú skal málið um skúlabygging viðgerast innan fyri fýra veggir. Hetta kalli eg myrkaspæl hjá samgonguni.

Er talan um ein rossahandil millum Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin, sum millum annað hevur til endamáls at flyta lærlingaútbúgvingar út úr Havnini ? - Livst so spyrst.

Tann vanvirðing, sum sitandi samgonga á tingið hevur víst yvir fyri skúlamálinum í Havn, kann ikki beskrivast. Skúlamálið er við vilja súltað í mentanarnevndini. Hetta er grov vanvirðing fyri tinginum, at tingskipanin ikki verður hildin orsakað av innanhýsis klandri um málið, og tí at samgonguflokkanir ikki tora at vísa sína støðu í málinum.

Uttan nakað yvirornað skúlapolitiskt mál og mið, er rossahandil nú gjørdur í samgonguni í besta 80-ára stíli um at handla skúlar sínámillum, har bossurin aftanfyri hesa ætlan er Høgni Hoydal landsstýrismaður, sum sigur hvussu umráðandi tað er, at henda semja verður hildin, til tess at fáa skúlaleiðslur og arðar partar at góðtaka hesa loysn.

Heldur skuldi Høgni Hoydal roynt at fingið skil á sínum egna flokki, áðrenn tingmenn og landsstýrismenn innanhýsis í Tjóðveldisflokkinum veruliga fara til hendurs. Men hetta er tjóðveldismonnum so líkt.

Og hesir ætla at stýra Føroyum við fullveldi.

VIÐMERKINGAR

# Kommunurnar eiga at steðga allari útbygging á eldraøkinum

**– tí Føroya landsstýrið ferð eftir ferð áleggur kommununum eyka útreiðslur og skerjir inntøkumøguleikarnar við sínum lógum og tarnar hervið neyðuga útbygging hjá kommununum**

**Finnleif Guttesen**
*býráðslimur*



Fíggjarmálaráharrin segði 24. apríl 2003 í løgtinginum, at kommunurnar høvdu gjørt sær dælt av at tíðirnar eru góðar og høvdu t.d. lækka sítt skattaprosent, og tí var tað í lagi at kommunurnar fingu eyka útreiðslur og at inntøkurnar verða skerdar.

**Ilt í afturpartin**

Nú veit eg ikki hvørjari planet ávísir landstýrismenn halda seg búleikast á, men mær vitandi hevur tað gingið gott í øllum Føroyum tey seinastu árini og tá ið landið hevur ráð til at lækka skattaprosentið, við at turka nakrar av hesum lækkingum uppá kommunurnar, so kann ein bert taka hattin av fyri teimun kommunum, sum samtíðis meta seg at hava ráð til at lækka sítt skattaprosent. Hví landstýrismenn skulu fáa ilt í afturpartin av hesum og revsa kommunurnar, skilji eg so slett ikki.

**Føroya kommunufelag**

Hevur alment í skrivt og talu átala framferðina hjá Føroya landstýrið mótvegis kommununum og hevur víst í tølum hvørjar útreiðslur kommunurnar fáa, men er hetta sum at sletta vatn á gás. Føroya landsstýrið leggur ein lort í hvat kommunufeløg skriva og siga, tað hevur framferðin víst tey seinastu árini.

**Steðgið tí allari útbygging á eldraøkinum**

Hvussu kann landsstýrið trúgva, at kommunurnar skulu góðtaka eykaútreiðslur uppá 32 mió krónur bara tvey tey seinastu árini og harufturat útbyggja eldraøki hjá landinum fyri 19 mió krónur um ári, tit mugu hava etið bláseym.

***Tað er landið, og ikki kommunurnar, sum hevur ábyrgd av eldraøkinum og tí er einki annað at gera hjá kommununum, við verandi politikki hjá Føroya landsstýrið mótvegis kommununum, enn at kommunurnar steðga øllum tí sum eitur útbygging á eldraøkinum t.v.s. sambýlir, ellisheim og onnur búpláss sum heild.***

Tíverri er hetta tað einasta sum Føroya landstýri skilur og kommunurnar eiga ikki at fara uppí nakað samstarv við landstýrið fyrr enn allar lógir um eyka útreiðslur og skerdar inntøkur hjá kommununum eru avtiknar.

# Klókur

**Hvat nyttar tað at vera klókur, um tú ikki hevur vísdóm til at brúka tína vitan?**

**Niclas Heri Jákupsson**



Læs herfyri bókina "Zar Kurski Torjzski" hjá russiska rithøvundanum Reyvkoski Umba Sumba. Hesa bók høvdu allir føroyingar havt gott av at lisið. Sjálvur læs eg hana á russiskum, men eg ivist onga løtu í, at ein so góð bók, av einum so ríkum og gevandi rithøvundi, eisini finst á fronskum ella týskum.

Ja, nakað soleiðis kann ein grein í okkara tíðindabløðum byrja. Og hon endar eins hástór: Kelda 1: Ein døgurði hjá Russiska diplomatinum í Prag, - kelda 2: Bókin "Sovjet – a land of freedom" eftir Peter Igornovatov og kelda 3: "Siberia" eftir Olgu Tjakovski.

Ja, hvat skal Palliba halda?

Tað eru nógv vælskrivandi fólk í Føroyum. Tey flestu kenna, at tað at skriva, er eitt kall. Tað, at ein søga, ella eitt evni, sum liggur teimum so nær, at tey eru noydd til at taka til pennin, fyri at fáa tað fest á blað. Hetta fyri at reinsa tann produktiva partin av heilanum, soleiðis at pláss er fyri nýggjum spennandi evnum. Hetta eru sum oftast fólk, sum hava virðing fyri okkara søgu, nútíð, mentan og tí politiska lívinum. Hesi fólk vita, at tey hava evnir, og at ábyrgd fylgir við hesum evnum. Tí er tað altíð hugaligt at lesa teirra greinar og viðmerkingar. Nú um dagarnar verða brøvini hjá Jákupi doktara upplisin í Útvarpi Føroya. Hesin djarvi og klóki maður hevur lagt eitt ófatuliga stórt arbeiðið, í alt tað, sum hann hevur fingist við. Hann hevur havt eitt "Jobs-tol", og er alt, sum hann hevur lagt eftir seg, sera væl úr hondum greitt. Um tú lesir hansara brøv, so er einki, sum eitur sjálvrós. Tú finnur ikki eitt orð, har hann upphevjar seg sjálvan á nakran hátt. Øll hini eiga rós, - hann er bert ein arbeiðari, sum hevur pennin sum arbeiðstól. Man kann ikki umganga at fáa virðing fyri slíkum menniskja.

Ta seinastu tíðina eru tað fleiri og fleiri vælskrivandi fólk, sum gera vart við seg í teirri føroysku pressuni. Tíverri hava hesi fólk bert ein málsetning við sínum greinum og viðmerkingum. Og tað er at greiða øllum øðrum føroyngum frá, hvussu klók tey sjálvi eru. Tey skriva um alt og einki, men ímillum linjurnar kanst tú lesa, hvussu nógv tey halda um seg sjálvi. Tey hava ein ófatuligan tørv fyri at upphevja seg sjálvan, sum nøkur yvirklók menniskjur. Evnini, ið tey skriva um, eru sera ymisk. Men felags fyri allar hesar greinar er, at lesarin skal fáa ta fatan, at aftanfyri greinina býr eitt flogvit, sum kann reksa upp russiskar heimspekingar og gomul greksk orðatøk í svøvni. Hesi fólk elska eisini at endurgeva stórar rithøvundar, líkasum fyri at fortelja okkum "minni klóku", at hetta er standardlesnaður hjá teimum. Tey flestu av okkum kenna seg skítbýtt, tí tað seinasta blaðið, ið vit lósu, var SMS-blaðið. Tað er eisini hamrandi óahugavert at lesa hesar greinar, har tað í hvørjum reglubroti verður víst til keldur, sum fyri tann vanliga borgaran er tað reina skvaldur. Keldur, sum lesarin ongantíð hevur hoyrt um, og sum einans finnast í kjallarum á støvugtum bókasøvnum. Nei betur eru greinar sum t.d. hjá Jákupi doktora, har hvørt orð er sprottið úr heilanum á rithøvundanum sjálvum, og har rithøvundurin sjálvur førir pennin, og kemur við niðurstøðum, sum ein og hvør skilur.

Men hví slíkan tørv at gerast limur í vísdómsfelagskapinum – og hvat er at vera klókur ? Vóru Mozart og Beethoven klókir ? Hvussu mundu teir klára seg í týskum stíli, - ella í fimleiki ? Var Einstein klókur ? Hvussu mundi hann klára seg sosialt ? Eg veit ikki, eg spyrji bara. Eg havi verið saman við nógvum "býttum" menniskjum, sum eru nógv vísari enn tey klókastu. Eg havi eisini verið saman við menniskjum, sum skulu eitast at vera klók, men sum ikki so frægt sum duga vanligan fólkaskikk. Hvat nyttar tað at vera klókur, tá tú ikki hevur vísdóm, til at brúka tína vitan ? Hvør er klókari, - tann sum fer á bingo í Skáalnum, ella tann sum fer í Norðurlandahúsið at lurta eftir fyrstu symfonini hjá Sunleifi ? Og hvør víðkar sín sjónarring meiri, - tann sum hyggur eftir fótbólti í Gundadali, ella tann sum fer í Listaskalan at skoða listina hjá Ingolfi ? Hvør avger, hvat er klókt og hvat er minni klókt ?

Um ein lesur greinirnar í bløðunum, sum omanfyri nevndu fólk hava skrivað, so hava hesi flogvit eftir øllum at døma tikið patent uppá allan vísdóm. Men sum ein vinmaður hjá mær plagar at taka til: Hugmóð ella dramblæti stendur fyri falli.

Tað er gott vit hava menniskju, sum seta sær stundir av til at skriva. Men eg haldi, at nógv áttu at umhugsa hvussu tey skriva, soleiðis at vit, sum lesa tað, ikki fáa ta fatan, at tann, sum stýrir penninum, er eitt háflogt nalvaskoðandi menniskja, sum einans skrivar, fyri at upphevja seg sjálvan.

# Karsten Hansen sigur ósatt um skattalættan

Karsten Hansen, landsstýrismaður, hevur í fjølmiðlunum boðað frá, at skattalættin sum samtyktur er, í fyrstu atløgu skal hjálpa teimum við lág- og miðalinntøkum.

Hyggja vit eftir tølunum í fylgiskjølunum 1 og 2 til lógina, síggja vit, at landsstýrismaðurin ikki sigur satt, tí tað eru ikki teir skattagjaldarar, sum hava lág- og miðalinntøkur, sum fáa størsta skattalættan.

Dømini vísa hinvegin, at tey sum hava rættiliga høgar inntøkur frammanundan, fáa størsta skattalættan, sambært skattapolitikkinum hjá verandi samgongu.

**Tey sum forvinna kr. 570.000,00 um árið fáa størsta skattalættan**

Taka vit nøkur av dømunum úr teimum ymisku inntøkubólkunum, síggja vit, at skattalættin er býttur soleiðis millum inntøkubólkarnar:

- ársinntøka kr. 110.000,00 gevur ein skattalætta sum er kr. 710,00 pr. ár.
- ársinntøka kr. 150.000,00 gevur ein skattalætta sum er kr. 860,00 pr. ár.
- ársinntøka kr. 180.000,00 gevur ein skattalætta sum er kr. 2.410,00 pr. ár.
- ársinntøka kr. 200.000,00 gevur ein skattalætta sum er kr. 2.610,00 pr. ár
- ársinntøka kr. 230.000,00 gevur ein skattalætta sum er kr. 2.910,00 pr. ár.
- ársinntøka kr. 250.000,00 gevur ein skattalætta sum er kr. 3.110,00 pr. ár.
- ársinntøka kr. 350.000,00 gevur ein skattalætta sum er kr. 4.110,00 pr. ár.
- ársinntøka kr. 400.000,00 gevur ein skattalætta sum er kr. 4.610,00 pr. ár.
- ársinntøka kr. 450.000,00 gevur ein skattalætta sum er kr. 5.110,00 pr. ár.
- ársinntøka kr. 500.000,00 gevur ein skattalætta sum er kr. 5.610,00 pr. ár.
- ársinntøka kr. 550.000,00 gevur ein skattalætta sum er kr. 6.110,00 pr. ár.
- ársinntøka kr. 570.000,00 gevur ein skattalætta sum er kr. 6.310,00 pr. ár.
- ársinntøka kr. 580.000,00 gevur ein skattalætta sum er kr. 5.840,00 pr. ár.

Av yvirlitinum, sum Fíggjarmálaráðið sjálvt hevur gjørt, sæst, at t.d. ein vanligur ófaklærdur arbeiðari við kr. 180.000,00 í ársinntøku, fær ein skattalætta pr. ár sum er kr. 2.410,00. Hinvegin fær ein skattgjaldari, sum frammanundan forvinnur kr. 570.000,00 pr. ár, ein skattalætta, sum er heilar kr. 6.310,00 pr. ár.

**Skattalættin munar lítið hjá teimum lágløntu**

Hóast landsstýrismaðurin við fíggjarmálum hevur roynt at brúka skattalættan sum grundgeving fyri áheitan sínari, um at fakfeløgini halda aftur við lønarkrøvunum, so vísa tølini, at tað ikki er tann vanligi ófaklærdi arbeiðarin, sum fær størstu sparingina, og tí er tað ein háðan ímóti fakfeløgunum hjá teimum ófaklærdu, at fíggjarmálaráðharrain soleiðis roynir at mæla fakfeløgunum at halda aftur við lønarkrøvum sínum.

Hetta ger landsstýrismaðurin, samstundis sum hann gevur teimum, sum frammanundan forvinna umleið 3,5 ferðir eina arbeiðaraløn, hægsta skattalættan.

Landsstýrismaðurin átti at skilt, at slíkur skattalætti ikki kann ávirka tey krøv, sum fakfeløgini seta fram um hækking í tímalønini, tí landsstýrismaðurin hevur við skattalætta sínum víst, at tað ikki er vanligi tímalønti arbeiðarin hann hugsar um, men hinvegin teir borgara, sum frammanundan hava tær hægstu inntøkurnar.

**Føroya Arbeiðarafelag,**
**Havnar Arbeiðsmannafelag,**
**Havnar Arbeiðskvinnufelag,**
**Klaksvíkar arbeiðsmannafelag**
**Klaksvíkar arbeiðskvinnufelag**